# Tering eftir nering

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**"Tey gomlu høvdu sum høvuðsreglu at: "Vit skuldu seta tering eftir nering"". Tað sigur Kári P. Højgaard í einum aftursvari til mína grein, sum kallaðist "Ein risastór rokning til allar føroyingar"**

Hesum taki eg fult undir við. Vit kunnu ikki í óavmarkaða tíð brúka meira enn vit forvinna. Tí er umráðandi, at vit gera eina langsiktaða ætlan fyri, hvussu inntøkurnar fáast at vaksa, ella útreiðslurnar at minka, nú landskassin hevur risastórt undirskot. Tað var hetta sum fekk meg at spyrja Kára P. Højgaard, í løgtinginum, hvør skal hava rokningina fyri mistu inntøkuna av blokkniðurskurðinum. - Hvør skal "tera" minni, nú stórur partur av "neringini" er burtur?

Og Kári P. Højgaard svaraði, at byrðarnar áttu at verða lagdar á tey sum høvdu meira enn 300 til 400.000 krónur í inntøku.

Eg havi síðani roknað út, at tað roknistykkið hongur als ikki saman, og at rokningin tí eisini fer at merkjast væl hjá teimum, sum hava lítla "nering" og tí lítið at "tera".

**Spyr, men svarar ikki**

Nú spyr Kári meg tveir spurningar. Tað skal hann sjálvandi vera vælkomin til, men eg fari tó at minna á, at eg í eini blaðgrein um ársskiftið setti honum 15 spurningar um somu viðurskifti, sum hann framvegis ikki hevur svarað. Kanska koma tey svarini í eini komandi grein?

**Stórur munur á CHE og ABC**

Kári endurgevur úr samgonguskjalinum, har tað stendur, at tað er umráðandi at samfelagið veksur seg til ein sjálvberandi búskap, og at tí hava samgonguflokkarnir gjørt av at lækka ríkisveitingina við 15 prosentum av reella inntøkuvøkstrinum av skattum og avgjøldum hjá landskassanum.

Hann spyr so, hvussu nógv ríkisveitingin lækkar eftir hesum frymlinum, og hví Sambandsflokkurin hevur undirritað eitt samgonguskjal um blokkniðurskurð.

**Lat meg byrja við tí seinna spurninginum:**

Áðrenn Sambandsflokkurin skipaði samgongu saman við Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum, høvdu vit CHE samgonguna, sum ætlaði at minka heildarveitingina við 117 mió. krónum longu í ár. Minnist meg rætt, so bjóðaði Sjálvstýrisflokkurin seg fram at vera stuðulsflokkur hjá hesi samgonguni, tá meiriluti ikki fekst fyri tí politikkinum longur. Tær 117 milliónirnar skuldu burtur, líkamikið um inntøkurnar stóðu í vøkstri ella vóru minkandi. Har var ikki spurt um "nering" ella "tering". Rokningin skuldi enn einaferð sendast til Føroya fólk – eisini til tey við teimum lægstu inntøkunum !

**Núverandi samgonguskjal**

Núverandi samgonga sigur, at ein treyt fyri at minka heildarveitingina er, at aðrar inntøkur vaksa. Ríkisveitingin kann minka við 15 prosentum av tí, sum fæst meira inn í skatti og avgjøldum. Vaksa inntøkurnar við 100 mió. krónum, so kann ríkisveitingin minka við 15 mió. krónum, soleiðis at samlaði vøksturin verður 85 mió. krónur. Vaksa skatta- og avgjaldsinntøkurnar ikki, so minkar heildarveitingin heldur ikki. Hetta er tað, sum vit kalla at "vaksa okkum til ein sjálvberandi búskap". Tað er vaksturin í inntøkunum, sum er avgerandi fyri, um heildarveitingin minkar ella ikki.

Onkur kritikari segði, tá samgonguskjalið var skrivað, at tað fór at taka 365 ár at fáa allan blokkstuðulin burtur eftir hesum leistinum. Hesum ivist eg í, men hetta var semjan, sum allir tríggir flokkarnir, við sínum ymiskleika, kundu liva við.

**Hin spurningurin**

Og so var tað hin spurningurin: Hvussu nógv fer blokkstuðulin at minka eftir hesum leistinum? Har má eg svara, at tað velst um inntøkurnar. Hann fer í hvussu so er ikki at minka meira enn tað sum aðrar inntøkur vaksa, og tann árliga upphæddin kemur ikki í nánd av teimum 117 milliónunum hjá CHE samgonguni og Sjálvstýrisflokkinum. – Sum maðurin segði: "Tering" eftir "nering".

# Maritimt lestrarumhvørvi í Norðoyggjum

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



**Stór undirtøka er á Føroya Løgtingi fyri at savna allar maritimar útbúgvingar í Klaksvík. Tað kom fram undir viðgerðini av óavsøkurøðu løgmans. Samgongan hevur eisini sett sær fyri at loysa hølistrupulleikarnar hjá Trygdarmiðstøðini. Verða hesar ætlanir veruleiki, fæst eitt mennandi lestrarumhvørvi í Norðoyggjum burturúr, og tað er neyðugt fyri aftur at skapa vøkstur í økinum**

**Maritimu útbúgvingarnar til Klaksvíkar**

Við at flyta maritimu útbúgvingarnar til Klaksvíkar afturat verandi útbúgvingarmøguleikum í økinum, fæst eitt mennandi lestrarumhvørvi burturúr. Hetta er neyðugt fyri at menna og varðveita Norðoyggjar, sum "kraftsentur" uttanfyri høvuðsstaðin. Fiskivinnan fer ivaleyst frameftir at vera drívmegin í økinum her norðuri, men neyðugt er við fleiri møguleikum, serliga á útbúgvingarøkinum, um komandi ættarlið skulu støðast og vera við til aftur at skapa vøkstur og framburð.

Við at flyta Vinnuháskúlan úr Havnini gerst eisini meira upplagt at menna Fróðskaparsetrið og granskingarumhvørvið í høvuðsstaðnum og fer tað at verða øllum landinum til frama.

Tað er tí ikki rætt, tá ført verður fram, at politikarar søkja at Havnini, tá tosað verður um at skipa maritimu útbúgvingarnar í Klaksvík. Tvørturímóti eigur hetta at verða sæð, sum ein roynd at lyfta landið alt á eitt hægri stig á útbúgvingar- og granskingarøkinum. Stórur tørvur er á betri hølisumstøðum bæði hjá Fróðskaparsetrinum og innan gransking í Føroyum. Bygningarnir hjá Vinnuháskúlanum eru upplagdir til hesi endamál.

Tróndheimur í Noreg, Akureyri í Íslandi og Oulu í Finnlandi eru dømi um júst tað sama. Lærdir háskúlar og hátøknilig framleiðsla verða raðfest, fyri at skapa "kraftsentur" uttanfyri høvuðstaðarøkini, sum kunnu geva høvuðsstaðarøkinum samstarvsmøguleikar, mótspæl og kapping øllum landinum til frama.

**Undirtøka á Føroya Løgtingi**

Stór undirtøka er á Føroya Løgtingi fyri at savna maritimu útbúgvingarnar í Klaksvík. Tað kom fram undir viðgerðini av ólavsøkurøðu løgmans. Tí eigur landsstýrið at smíða, meðan jarnið er heitt, taka politisku avgerðina, fara undir at fyrireika ætlanina og síðan seta hana í verk alt fyri eitt.

Komið er eisini fram, at ætlanir liggja í Mentamálaráðnum um at byggja nýggjan Vinnuháskúla, eftir at nautisku og maskinútbúgvingarnar vóru lagdar saman. Tí skuldi verið lag á manni at farið undir at bygt nýggjan Vinnuháskúla í Klaksvík. Ein slík byggiverkætlan hevði eisini verið rættiliga arbeiðsskapandi í økinum, nú fiskivinnan so at siga er steðgað upp og talið av arbeiðsleysum er munandi økt.

Seinnu árini er nógv gjørt við at útbyggja samferðslunetið við ferjum, vegum, brúm og tunnlum. Hesar útbyggingar hava verið neyðugar, men tað er umráðandi, at tær ikki einans eggja til einvegis ferðslu. Tí er neyðugt, at almenni myndugleikin eisini hugsar geografiskt við at spjaða alment virksemi um alt landið.

**Nýggja Trygdarmiðstøð í Klaksvík partur av maritima umhvørvinum**

Undanfarna ABC-samgonga var komin langt áleiðis við fyrireikingunum til tess at fara undir at byggja nýggja Trygdarmiðstøð í Klaksvík. Peningur var eisini settur av til endamálið. Ætlanin varð tó fullkomuliga slept, tá CHE-samgongan tók við. Sitandi ABC-samgonga hevur aftur sett málið á dagsskrá og hevur í samgonguskjalinum ásett, at: "*Hølistrupulleikarnir hjá Trygdarmiðstøðini verða loystir*". Eisini í álitinum til fíggjarlógina fyri 2009 verður mælt til at: "*fyrireikingarnar at byggja nýggja trygdarmiðstøð í Klaksvík eiga at halda fram*".

Nú landsstýrið aftur arbeiðir við at gera tillagingar í samband við íløguætlanina, og í tí sambandi fer at leggja fram eykajáttanarlóg fyri Løgtingið í heyst, eigur spurningurin um Trygdarmiðstøðina at verða tikin við og loystur.

Fari av somu orsøk at mæla landsstýrismonnunum í fiskivinnu- og fíggjarmálum til at laga tillagingarnar á íløguætlanini soleiðis at farast kann undir at byggja nýggja Trygdarmiðstøð alt fyri eitt, ella í øðrum lagi, at hóskandi høli verða keypt í Klaksvík, og sum verða umbygd til endamálið.

Ein nýggj trygdarmiðstøð kann soleiðis gerast fyrsta stigið í arbeiðnum at skapa eitt fjølbroytt lestrarumhvørvi í Norðoyggjum, har maritimi parturin og tilknýtið til sjógvin verður berandi, men har aðrar útbúgvingar innan onnur øki eisini gerast partur.

Fyrilestur við Inge S. Enge



**Mikukvøldið 26. august kl. 19.30**
heldur Inge S. Enge, norskur stórtingslimur, fyrilestur fyri Demokratiu.

Hon fer at røða um týdningin av javnstøðu í politikki og um egnar royndir.

Fyrilesturin verður hildin í Miðlahúsinum.

Tiltakið er alment og ókeypis.

**ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN.**
**Vónandi møta nógv.**

**DEMOKRATIA**

Demokratia | 100 Tórshavn
Tlf. 212848 | www.demokratia.fo